## Egil spælur aftur

Egil á Bø hevur tosað við formannin í EB/Streymi, og tikið støðu til, at hann byrjar aftur við fótbóltinum. Tað hendir eftir, at hann í farnu viku boðaði frá, at hann nú gavst at spæla. – So fáa vit at síggja, um eg verði partur av hópinum, tá nýggi venjarin kemur til, men eg eri so byrjaður at venja aftur, sigur Egil á Bø og harmast um, at støðan bleiv, sum hon bleiv. – Eg eri keddur um, at tað bleiv soleiðis, men sum støðan var, so hevði eg ikki hug at halda áfram og valdi tí at gevast, greiðir Egil á Bø frá, sum eftir øllum at døma verður aftur á vøllinum sunnudagin, tá EB/Streymur tekur móti KÍ.



## Sheila setti aftur met

Á triðja sinni hesa seinastu vikuna hevur Sheila Millum Garðarnar sett føroyskt met í heimsmeistarakappingini í Rom. Fyrrapartin í dag setti hon met í 50 metrar firvald. Hon svam teinin við tíðini 29,56 sekund. Gamla metið, sum hon sjálv átti, var 29,80 sekund. Hon endaði tískil nummar 77 av 132 luttakarum. Therese Alshammar úr Svøríki átti skjótastu tíðina. Hon svav teinin við tíðini 25,44 sekund.

Víkingur – AB:

# Steypavinnnararnir aftur í eldin

**Nýklæktu steypavinnnararnir úr Víkingi skulu syrgja fyri at fáa samband við heimin aftur, tá skerdir argjamenn vitja í Sarpugerði**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*



Víkingur vann mikudagin fyrsta gullmerki í søgu felagsins. Eitt gullmerki, ið hevur ovurhondsstóran týdning fyri felagið og bygdirnar Gøtu og Leirvík. Men longu sunnudagin skulu víkingarnir aftur í eldin. Og fyrsta uppgávan hjá Jógvan Martini Olsen, venjara, er at syrgja fyri, at leikararnir aftur fáa samband við heimin.

### Magnus ivasamur

Tað er í øllum førum greitt, at Sam Jacobsen og Sverri Jacobsen ikki verða í hópinum hjá Víkingi. Teir hava báðir skaða at dragast fyri, og tí verður venjarin teir fyri uttan.

Magnus Skoralíð er eisini ivasamur. Tað hevur hann verið seinastu vikuna, og tí var hann millum annað ikki á vøllinum í steypafinaluni.

Á Argjum eru teir aftur hótt av niðurflytingarvanda. Klaksvíkingar hava vunnið seg væl nærri uppflytarunum, sum nú eru trýstir. Tað er líkt til, at Stig-Roar Søbstad, sum skrivaði sáttmála við felagið fyrr í vikuni, fer at spæla sín fyrsta dyst í føroysku landskappingini.

Liðskiparin Kenneth Jacobsen hevur leikbann um vikuskiftið. Janus Joensen er staddur í Danmark í útbúgvingarørindum, meðan Tróndur Sigurðsson, John Hansen og Mortan úr Hørg eru ivasamir. Venjararnir hava tí ikki serliga nógv fólk at velja millum, har fleiri av ungu argjamonnunum helsta verða álitið sunnudagin. Stigini mugu í øllum førum koma skjótt.

**AB er einans tvey stig omanfyri niðurflytingarmarkið**

# Tað gongur sum eftir ánni á Toftum

**Stórur munur hevur seinastu nógvu ferðirnar verið á úrtøkuni hjá B68 og B36, sum hesa ferð hittast á Svangaskarði**

B68-B36
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Toftamenn bíða ótolnir eftir at sleppa upp í part aftur. Síðsta sunnudag høvdu teir frí, tí oyggjauppgerðin ímóti Víkingi var útsett orsaka av steypafinaluni.

Sunnudagin fær B68 vitjan av B36. Tað er ógvuliga stórur munur á, hvussu tað nógvu tær seinastu ferðirnar hevur vignast hjá árstalsfeløgunum báðum. B68 hevur ikki tapt síðani 26. apríl, tá ið ÍF á heimavølli vann 3-2. Síðani tá hevur B68 úrtøkan verið 25 stig í ellivu dystum. Í sama tíðarskeiði hevur úrtøkan hjá B36 verið 8 stig. Ymiska úrtøkan ber við sær, at B68 stríðist fyri at fáa fatur á oddaliðnum HB, meðan teir í B36 royna at renna undan botnliðunum.

B68 venjarin, Bill Jacobsen, hevur positivar trupulleikar. Tað eru nógvir um boðið, og venjarin skal taka støðu til, hvør skal sita uttanfyri sunnudagin. Miðvallarin Ndende var leikbannaður, tá ið B68 vann 4-2 í Klaksvík. Hann er sjálvskrivaður á sentrala miðvøllinum.

Í B36 er stóri spurningurin, hvussu tað verður við Christian R. Mouritsen. Í ólavsøkudystinum ímóti HB skoraði hann trý mál. Síðani hevur tað víst seg, at spæliloyvið ikki er flutt úr HB og til B36. Flytingarvindeygað er afturlatið, og tað verður upp til kappingarnevndina hjá FSF at gera av, hvussu hetta málið skal loysast.